# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Noreg er vælkomið at royna semju millum okkum og USA, um nakað kann koma burturúr* *(norðurkoreanskur diplomatur).*

# Hildu tað vera yvirgang

**Nógvir New York-búgvar hildu, at yvirgangsmenn vóru á ferð, tá eitt lítið flogfar rendi á eini íbúðarhús á Manhattan í gjár. Og so var tað jú 11. oktober.**



*Eldur kom í fleiri íbúðir, tá tað lítla flogfarið rendi á háhúsini.*

-Sjálvandi var tað tað fyrsta, eg hugsaði, sigur Josef Cap við altjóða tíðindastovurnar.

Sløkkiliðsbilar og løgreglubilar í stórum tali vóru skjótir til Upper Street á Manhattan, tá boð komu um, at eitt lítið flogfar hevði rent á ein meiri enn 50 hæddir høgan íbúðarbygning. Í luftini sveimaðu fleiri tyrlur, og fólk í stórum tali komu at vita, hvat var áfatt. Fólk, sum búðu í íbúðarhúsunum, kvikaðu sær út, og tey, sum ikki vóru heima, tá flogfarið rendi á húsini, sluppu ikki inn, tí løgreglan forðaði teimum.

Amerikonsku myndugleikarnir váttaðu í gjárkvøldið, at teir settu allar trygdarskipanir í verk, tá tað frættist, at eitt flogfar hevði rent á eini háhús í New York. Verjumálaráðið Pentagon váttaði, at tað hevði sent fleiri jagaraflogfør á flog uppi yvir teimum stóru býunum, men tey fingu tó skjótt boð um at venda aftur, tá tað gjørdist greitt, at talan var ikki um yvirgang, men um eina vanlukku.

Tað vísti seg, at talan var um eitt lítið flogfar við tveimum monnum umborð. Annar teirra var ein kendur basaball-spælari, Cory Lidle, sum var í ferð við at læra til flogskipara. Hin maðurin var lærari hansara. Báðir doyðu í vanlukkuni.

# Avvarðandi fáa endurgjald 24 ár eftir flogvanlukku

**Í mars í 1982 datt eitt norskt innanríkisflogfar niður í Norðurnoregi undir løgnum umstøðum. Nú fáa tey avvarðandi endurgjald.**

Flogfarið, sum var av slagnum Twin Otter, var á veg úr Berlevåg til Mehamn, tá tað brádliga hvarv. Fólk høvdu hoyrt flogfarið, og alt tóktist vera sum vanligt, til ljóðið hvarv. Tríggjar dagar seinni varð vrakið funnið á havbotninum. Tey 15, sum vóru við, vóru deyð.

Um hetta sama mundið var ein hernaðarvenjing í Norðurnoregi, og fólk vildu vera við, at flogfarið mundi hava stoytt saman við eitt bretskt hernaðarflogfar, tí bretsk flogfør vóru á vanlukkuleiðini, tá flogfarið hvarv.

Tað hevur tikið sera drúgva tíð at finna útav, hvat veruliga hendi, og hóast tríggjar kanningarnevndir hava kannað tilburðin, hevur eingin teirra nakað endaligt svar. Tann seinasta frágreiðingin kom í september í fjør, og har stóð, at tað er neyvan hugsandi, at ferðamannaflogfarið og eitt av hernaðarflogførunum stoyttu saman. Kanningarnevndin helt harafturímóti, at hæddarmátarin í norska flogfarinum var farin av lagi orsakað av óvanliga hørðum turbolensi, og at tað var orsøkin til vanlukkuna.

Avvarðandi hjá teimum, sum doyðu í vanlukkuni, hava øll árini kravt endurgjald, og í vár samtykti Stórtingið eina serliga endurgjaldsskipan fyri Mehamn-vanlukkuna. Tað er sambært henni, at tey avvarðandi nú fáa smáar níggju milliónir norskar krónur í endurgjaldi. Hjúnarfelagi, sambúgvi og børn fáa 200.000 krónur, meðan foreldur og systkin fáa 50.000 krónur. Nøkur fáa tó eitt sindur meiri.

# Noreg kann royna semju millum Norðurkorea og USA

**Norðurkorea er til reiðar at lata Noreg royna semju í kjarnorkutrætuni við USA, um nakað kann koma burturúr.**

-Noreg er hjartaliga vælkomið at virka sum semingsmaður, um tað kann medvirka til at loysa trupulleikarnar, sigur Kim Su Yong á norðurkoreonsku sendistovuni í Stockholm við Dagsavisen.

Hann ger vart við, at Norðurkorea hevur ikki tosað við myndugleikarnar í Oslo um spurningin, men í norska uttanríkisráðnum fær hugskotið góða móttøku.

-Tað er kortini greitt, at tað eru teir, sum mugu taka tað fyrsta stigið, sigur Raymond Johansen, sum er ríkisskrivari í uttanríkisráðnum. Hann leggur samstundis dent á, at ein møguligt norsk vælvild merkir ikki, at Noreg góðkennir tann norðurkoreanska kjarnorkupolitikkin.

Norskir myndugleikar hava fyrr verið millumlið millum Norðurkorea og USA. Seinast var, tá ein týðandi norskur diplomatur var í Norðurkorea. Á veg heimaftur kunnaði hann amerikanska varauttanríkisráðharran Christopher Hill um tingingarnar í Norðurkorea, skrivar Dagsavisen.